Dagf. 24. mai 2023
HMR j. nr. 23/10865

Margit Stóra
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurningur nr. 52-099/2022 eftir § 52 a í tingskipanini um rúsandi heilivág, frá Liljan Weihe, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu er býtið av diagnostiseringum av ADHD millum tað almenna og privatstarvandi serlæknar?
2. Hvussu er býtið av útskrivaðum Ritalin og kopiheilivági millum tað almenna og privatstarvandi serlæknar?
3. Í hvønn mun samstarvar almenni geirin við privatstarvandi serlæknar um diagnostisering og viðgerð av ADHD?

Svar:

Til spurning 1
Heilsumálaráðið hevur ikki innlit í, hvat verður diagnostisera hjá privatpraktiserandi serlæknum í Føroyum og kann tí ikki upplýsa, hvussu býti er av diagnostiseringum av ADHD millum tað almenna og privatstarvandi serlæknar.

Tað er Landslæknin, sum sambært § 5 í autorisatiónslógini, hevur eftirlit við fakliga virkseminum, ið m.a. verður veitt av løggildum heilsustarvsfólkum í Føroyum, eisini løggildum privatstarvandi serlæknum. Løggild heilsustarvsfólk, ið starvast í Føroyum, hava sína løggilding frá Styrelsen for Patientsikkerhed í Danmark. Eitt løggilt heilsustarvsfólk hevur skyldu til at lata Landslæknanum frágreiðing og upplýsingar til eftirlitið hjá Landslæknanum, umframt viðvirka til, at eftirlitið verður framt. Í sambandi við eftirlitið er møguligt at seta revsitiltøk í verk, t.d. við at avmarka virkisøkið hjá viðkomandi ella í síðsta enda at taka løggildingina frá viðkomandi.

Til spurning 2
Talvan niðanfyri vísir, hvussu býtið er í prosentum millum tað sum læknar hava ávíst av heilivági í ávikavist talgildu heilsuskipanini Cosmic og uttanfyri, tá ið talan er um ADHD heilivág, sum inniheldur evnið methylphenidat (Ritalin og kopiheilivágur).

Tá ið methylphenidat (Ritalin og kopiheilivágur) verður ávíst umvegis Cosmic, eru tað læknar, sum arbeiða fast ella sum avloysarar/konsulentar í almenna sjúkrahúsverkinum ella í kommunulæknaskipanini, sum bíleggja heilivágin.

Í teimum førum har methylphenidat (Ritalin og kopiheilivágur) verður ávíst uttanfyri Cosmic, er ávísingin, í høvuðsheitum framd í sambandi við privat serlæknavirksemi í Føroyum. Harumframt hava eisini serlæknar í t.d. Danmark, í minni mun ávíst heilivágin til borgarar í Føroyum.

Ár	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Serlæknar og læknar, ið ávísa methylphenidat umvegis Cosmic (Prosent av tí samlaða heilivágnum)	100,0	98,3	94,4	88,1	79,1	72,2	74,3
Serlæknar og læknar, ið ávísa methylphenidat uttanfyri Cosmic (Prosent av tí samlaða heilivágnum)	0,0	1,7	5,6	11,9	20,9	27,8	25,7

Sambært kunngerðini um sjúklingajournalir, sum er galdandi í Føroyum, er tað ikki eitt krav at øll heilsustarvsfólk, t.d. privatstarvandi serlæknar, skulu skráseta heilsuupplýsingar í talgilda journal. Upplýsingarnar kunnu eisini skrásetast í pappírsjournal.

Tá ið læknar skulu ávísa reseptheilivág (forskriftir) er støðan øðrvísi. Í oktober 2022 kom ein nýggj kunngerð um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtlutan í gildi, har tað er ásett, at forskriftir (reseptir) skulu ávísast talgilt umvegis talgildu heilsuskipanina hjá heilsumyndugleikunum (í løtuni er talan um skipanina Cosmic). Í somu kunngerð er eisini ásett, at Landsapotekarin kann geva undantak frá kravinum, um serlig viðurskifti tala fyri hesum. Hendan møguleika hevur Landsapotekarin brúkt, soleiðis at læknar, sum hava ávíst heilivág uttanfyri Cosmic, hava møguleika at knýta seg í skipanina við eini rímiligari freist.

Tað er eisini vert at nevna, at tað er Landslæknin sum hevur eftirlit við ordinatiónunum hjá læknunum. Heilivágur fyri ADHD er heilivágur, sum er undir serligum eftirliti, sambært § 4 í "Kunngerð um forskriftir, heilivágsbílegging og skamtan av heilivági". Apoteksverkið sendir Landslæknanum yvirlit yvir allar útflýggjanir av § 4 heilivági.

Til spurning 3
Sambært Sjúkrahúsverkinum er onki skipað samstarv á psykiatriska økinum millum almenna geiran og privatstarvandi serlæknar.

Heilsumálaráðið, 24. mai 2023

Margit Stórá
landsstýriskvinna